SSP



Ung og lívið

# Foreldrafundur í hádeild

Tey ungu hava brúk fyri, at foreldur tosa saman, um hvussu foreldur á ein góðan hátt kunnu vera um tey, ímeðan tey læra at fóta sær í ungdómsárunum.

Vit bjóða tykkum á ein felags foreldrafund **týsdagin 28. nov. 2023 kl. 17.00-19.00 á Skúlanum við Løgmannabreyt,** har vit seta á stovn eitt foreldraforum um **Ung og lívið** í **8. flokki.**

Tað er gevandi hjá foreldrum at hittast og skifta orð um áskoðarnir, rammur, sosialu samveruna og trivnaðin í flokkinum. Ynskiligt er, at bæði foreldur luttaka.

Daisy j. Iversen, SSP-ráðgevi, leggur fyri.

Fyri at fáa innlit í støðuna hjá næmingunum, hittir hon teir fyrr um dagin.

Gevi flokslærarunum boð, um tit koma ella ikki.